# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vil ikki skipanini væl

Barsilsskipanin eigur ongan góðan, um tosast skal um politiska landslagið í Føroyum. Fyrr í ár kundu vit staðfesta, at landskassin seinnu árini hevur kravt milliónir ov nógv inn í barsilsgjaldi. Milliónir, ið ongan tíð eru komin føroyskum barnafamiljum til góðar, men sum ístaðin eru endaðar í stóra potti. Hetta var um sama mundi, sum landsstýrismaðurin í vinnumálum barslaði við ætlanum sínum um at styrkja um skipanina, soleiðis at útgjaldið kundið bæði leingjast og økjast.

Frá hinum pørtunum á arbeiðsmarknaðinum vóru boðini tó greið. Tey góvu landsstýrismanninum krakk við teirri grundgeving, at tey fyrst og fremst vildu hava, at skipanin verður umsitin av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Til dømis við at verða skipað sum grunnur eins og ALS.

Um tað er av ótta fyri enn eina ferð at verða lagdur undir at krevja eykaskatt inn, skulu vit lata vera ósagt. Men tað tykist heilt burturvið, tá landsstýrismaðurin nú boðar frá, at hann fer at lække inngjaldið í skipanina.

Er tað so, at 10 milliónir koma "ov nógv" inn í skipanina komandi ár, so skuldi tað verið lag á manni at bøtt um hesa, heldur enn at skerja um virkismøguleikarnar hjá skipanini.

Ein bati – sum landsstýrismaðurin hevur fulla heimild at fremja sjálvur – er at hækka hámarkið fyri útgjaldinum. Hetta hámark er í dag væl lægri enn miðalinntøkan hjá pápunum er. Og er tí beinleiðis við til at fremja eitt skeivt kynjabýti. Snøgt sagt tí páparnir missa inntøku við at fáa pening úr Barsilsskipanini. Lóggávan gevur landsstýrismanninum heimild at prístalsviðgera hámarksútgjaldið, men hesa heimild hevur landsstýrismaðurin ongan tíð nýtt. Heldur ikki hóast stórt yvirskot hevur verið í skipanini seinnu árini.

**Sosialurin**

## FO INVASION í Keymannahavn

TÍÐINDASKRIV



Leygarkvøldið 24. nov. verður fjøllbroyttur tónleikur í Kulturhuset Islandsbrygge, sum liggur miðskeiðis í Keypmannahavn og beint við sjógvin, har føroyingar fara at framføra Vísur, Blues, Punk og Rock´n Roll.

Kvøldið byrjar við eini konsert, har Hanus G. Johansen og Jógvan Andrias Joensen fara at framføra vísur. Aftaná fer Mr Blues Uni Reinert Debess við fólki á pallin. Okkurt óvænta er eisini á skránni. Aftaná miðnátt fara The Dreams at strála positivan punk og rokk til gestirnar, sum eisini uppliva Ketchup-plátuvendarnar Hallur Johannesen og Kára Davidsen.

Í ár eru 20 ár liðin síðan teir bágir vísusangarnir og vinmennirnir byrjaðu at framføra tónleik saman, Hanus G. Johansen og Jógvan Andrias Joensen, sum bágir eru úr Klaksvík.

Stigtakarin av FO INVASION, eins og í fjør, er hoyvíkingurin og útisetin Edmund S. Jacobsen, sum hevur áhugað í føroyskum tiltøkum í Keypmannahavn. Aftaná tvey á Skarvi sum fyriskipari, steðgaði hann samstarvið. Framyvir vil Edmund vera ein sokallaður freelance booker. Í dag skrivaði Edmund sáttmála við Kulturhuset Islandsbrygge um leigu og til tiltakið FO INVASION, sum er fyri øll. Danir gleðast um at samskipa eitt føroyskt tiltak, men kanska bert so leingi vit ikki loysa, sigur Edmund at enda við Sosialin.

Meira um tiltakið á www.k-i-b.dk

## Leingja barnsburðarfarloyvið? Ja takk!



**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**
Tj´ðveldi
bergtorajoensen@gmail.com

Hoyrdi í tíðindunum í kvøld, at ætlanin er at seta inngjaldið til barilsskipanina niður. Hetta, tí at útgjaldið er minni enn inngjaldið. Well, átti hetta ikki at verið ein gyltur møguleiki at longt barnsburðarfarloyvið? Skilti, at um ikki gjaldið bleiv sett niður endaði yvirskotið í landskassanum. Harmiligt, at arbeitt ikki hevur verið við málinum fyrr enn nú avgerð verður tikin um at seta gjaldið niður. Ábendingar hava væl verið eina tíð um at so er.

24 vikurs barnsburðarfarloyvið er minni enn flestu familjurnar halda vera nøktandi. Spell, at vit ikki hava eina barsilsskipan sum familjurnar trívast við.

Tosaði herfyri við eina vinku, sum nýliga hevði átt. Hon vildi so sera fegin verið heima hjá pinkurbarninum í eitt ár. Men tað var ikki hugsingur um, tá hon onga inntøku fór at hava aftan á fyrstu 24 vikurnar. Húsalán upp á 1,5 millión ella meir, settu krøv um tvær góðar inntøkur. Hesin er veruleikin hjá nógvum smábarnafamiljum: Eitt brennandi ynski um at vera heima hjá barninum til tað er 1 ár, men vegna húsalán kann húskið ikki liva av eini inntøku.

Onkur sigur, ja men so mugu fólk lata vera við at keypa so dýr hús, øllum nýtist ikki at búgva í Havn. Eg spyrji: Skal høvuðsstaðurin bara vera fyri tey ríku. Eg haldi, at tað er sera umráðandi, at eisini høvuðsstaðurin endurspeglar samfelagið vit liva í. Barnafamiljurnar eru sera týdingarmklar í hesu mynd. Sagt verður, at fólk bara kunnu keypa kommunal hús og grundstykki, heldur enn frá privatum. Trupulleikin er bert, at eisini kommunalu prísirnir seta krøv um meir enn tvær miðalinntøkur. Meini so við, eini raðhús Undir Kongavarða kosta millum 2,5 og 2,9 milliónir.

Vælvitandi, at trupulleikan við barsislsskipanini í veruleikanum snýr seg um ein knút - øðrumegin stýrið fyri barsilsskipanina og landsstýrismannin í vinnumálum og hinumegin formansskap løgtingsins - so er talan um ein veldugan møguleika at tryggja korini hjá barnafamiljunum. Knútar eru jú til at loysa.

Um peningur ikki er til eitt árs barnsburðarfarloyvið við fullari løn, kundi skipanin í staðin latið svarandi til ALS í einar tríggjar – seks mánaðir afturat teim núverandi 24 vikunum við fullari løn.

Ein gyltur møguleiki hjá verandi mansstýri, eg meini landsstýrið at bøta um støðuna. Mátti veri møguligt!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.